# Pápin var kanska ikki einsamallur

**Hurðin í kjallaranum hjá Josef Fritz vigar 600 pund, og hann má hava fingið hjálp til at seta hana í, heldur løgreglan**

Eysturríkska løgreglan ivast nú í, um Josef Fritzl var tann einasti, sum visti, hvat fór fram niðri í kjallara hansara. Fyrr hevur ein týskur krimiserfrøðingur sagt seg vera sannførdan um, at kona Josef, Rosemarie, má hava vitað, hvat maðurin fekst við niðriundir, og í dag sigur ein kvinna, sum leigaði frá hjúnunum fyri nøkrum árum síðani, at ein sonur teirra hevði lykil til kjallaran.

- Eg og beiggi mín, sum leigaðu frá teimum, bóðu um at fáa eitt rúm í kjallaranum, men fingu at vita, at har var einki pláss. Nú skilji eg hví, sigur kvinnan við eitt týskt blað.

Løgreglan í Amstetten setir eisini spurnartekin við, hvussu Josef Fritzl bar seg at, tá hann setti hurðina í tað rúmið, sum dóttirin og børnini vóru í. Hurðin, sum er úr stáli, vigar 600 pund, so hann kann ikki hava sett hana í einsamallur. Talsmaðurin hjá løgregluni í Amstetten sigur, at tað kann sjálvandi hugsast, at hurðin bleiv sett í, áðrenn Elisabeth bleiv stongd inni í kjallaranum.

Samstundis kannar eysturríkska løgreglan, um Josef Fritzl kann hava fingist við okkurt annað ólógligt virksemi aðrastaðni enn heima við hús. Tað vísir seg, at hann eigur eisini hús í øðrum býum enn Amstetten, og tey er løgreglan nú í ferð við at kanna.



*Var Josef Fritzl tann einasti, sum visti um ræðuleikarnar í kjallaranum? Tann spurningin kannar eysturríkska løgreglan nú*
*Mynd: Polfoto*


Boks 76 | FO-110 Tórshavn | Tel +298 341800 | lysing@sosialurin.fo




Eins og undanfarin ár fara vit aftur at geva út blaðið »Bilar«, ið verður prentað sum serblað í Sosialinum 7. mai.

Í blaðnum skriva vit um akfør og ferðslu í breiðastu merking. Nógv verður eisini gjørt burturúr bilnýggjheitum, trygdarútgerð og upplýsandi tilfari til bileigarar.

Hesaferð koma vit eisini at leggja dent á flutningsvinnuna sum heild. Blaðið kemur út samstundis sum fólk fyrireika seg til summarið.

Vit meta, at tilfar um bilar, ferðslu og flutningsvinnuna hevur stóran áhuga millum fólk. Tað er eisini við hesum í huga, at blaðið seinastu nógvu árini hevur sett tíð, pláss og orku av til at skriva um akfør og ferðslu hvørja viku og givið serbløð út.

| Lýsingarstødd | | Kostnaður |
|---|---|---|
| • 1/4 síða | (125 mm x 171 mm) | 1.950 kr. + mvg |
| • 1/2 síða | (125 mm x 346 mm ella 254 x 171 mm) | 3.900 kr. + mvg |
| • 1/1 síða | (254 mm x 346 mm) | 7.800 kr. + mvg |
| • Opna (2 síður) | (536 mm x 346 mm) | 10.000 kr. + mvg |

*Gevið gætur: framleiðslan av lýsingum er við í kostnaðinum, um ynski er um tað.*

*Allir prísirnar eru uttan mvg*

Tilfar til blaðið skal vera okkum í hendi áðrenn 2. mai.

Sosialurin